

# Noreg: Oljubrunnarnir geva meir olju enn ein helt fyri tíggju árum síðani

**Jógvan Hugo Gardar**

26.05.2015 - 22:51

Oljan.fo

Norska Oljustovan hevur gjøgnumgingið tey økini har olja er funnin í tiðarskeiðnum 2005 til 2014. Kanningin vísir at tað nú er meir olja at framleiða enn tað var í 2005, umframt at serfrøðingarnir rokna við at meir olja kann finnast.

Hetta stendur skrivað á heimasíðuni hjá Oljustovuni.

Kirsti Veggeland, deildarleiðari á Oljustovuni, sigur at nógv kanningararbeiði hevur gjørt at meir olja verður funnin, og at meir kann framleiðast.

- Tær týdningarmiklastu orsøkirnar til hetta er at vit nú hava fleiri brunnar sum eru í framleiðslu, livitíðin hjá brunnunum er økt umframt at vit hava fingið meir kunnleika um brunnarnar, sigur hon.

Umframt at hyggja eftir brunnum sum vóru í framleiðslu í 2005, so hevur eisini verið kannað hvussu gongdin hevur verið í 62 fundum, ið oljufeløgini ikki høvdu tikið avgerð um at byrja at framleiða frá. Av hesum eru 28 fund nú sett í framleiðslu, og tilfeingið i hesum brunnunum vísir seg at vera tað tvífalda av tí man helt.

Av fundum sum eru gjørt aftaná 2004, so eru 13 økir nú í framleiðslu.